## Deyðilig smitta í áum

**Norskur granskari er komin fram til, at ILA-smittan er at finna í náttúruni, og tí er nærum vónleyst at sleppa heilt av við hana. Hetta fer at styrkja kravið hjá alarum at sleppa at koppseta ímóti ILA**

ILALING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Heilir firðir hava verið stongdir fyri aling í royndunum at basa ILA-smittuni. Tá ið smittan hevur víst seg hava boðini frá myndugleikunum til alarar verið, at teir skulu slakta alt og síðan lata fjørðin fáa frið og hvíla, til smittan er burtur.

Nú verður spurnartekn sett við, um tað er nóg mikið. Norski professarin við Institutt for fiskeri og marin biologi, Are Nylund, heldur seg hava avdúkað smittukelduna til ILA.

Are Nylund sigur, at smittan kemur frá villum sílum. Tíggju ár eftir, at hann fyrstu ferð fann smittuna og eftir kanningar í norskum áum í 2001 og 2002, er Nylund komin til ta niðurstøðu, at vill síl eru smittuberar av ILA, og at smittan hevur verið í náttúruni í langa tíð.

Sílini verða ikki sjúk av ILA, tí tey hava eina virus við frábrigdi. Men tá ið hon fer yvir í alilaksin hendir í nøkrum førum ein broyting í arvaeginleikunum, og broytta virussið er bæði smittandi og deyðiligt. Í einum alibrúki breiðir smittan seg skjótt.

Alarar hava leingi biðið um loyvi at koppseta ímóti ILA, men ES hevur higartil sagt kortanei. Málið hjá ES er at útrudda sjúkuna. Eru niðurstøðurnar hjá Are Nylund eftirfarandi er stríðið ímóti ILA til fánýtis, tí sjúkan fer at koma afturíaftur frá náttúrligu smittukelduni. Óivað fara nýggju vísindaligu úrslitini at birta uppundir uppaftur størri kravi um at sleppa at koppseta ímóti ILA.

# Alivinnan fær skrappan kost

ALIVINNAN Á VEGAMÓTI. *Verður farið ov harðliga fram ímóti ILA, kann greinin sagast av, sum vinnan situr á. Verður farið fram sum higartil, so breiðir smittan seg sum ringar í vatninum. Tvær kunngerðir eru til hoyringar hjá vinnuni í løtuni, sum skulu rudda slóð fyri, at føroyingar sleppa at koppseta*







**Ein ætlan er í umbúna fyri alivinnuna, sum hevur við sær, at firðir javnan skulu tømast fyri aling og hvíla. Ættarliðini av alifiski skulu skiljast sundur. Samstundis verður eftirlitið hert. Eitt nú fáa alibrúkini vitjan av Heilsufrøðiligu starvsstovu hvønn einasta mánað**

ALIVINNA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

ILA hevur kostað føroyska samfelagnum 200 milliónir krónur. Tað eru turru og talandi tølini, sum Havbúnaðarfelagið er komið til, eftir at ein kreppubólkur hevur kannað alivinnuna. Samstundis kann staðfestast, at øll eginogning í alivinnuni, sum fyri tveimum árum síðan var 500 milliónir krónur, er horvin sum døgg fyri sól.

Prísurin á laksi hevur verið í botni, men nú síggja marknaðarútlitini eitt sindur bjartari út. Trupulleikin er ILA, ið liggur sum ein kleppur um beinini á alivinnuni.

– Útlitini eru út av lagi vánalig, og tað kemst fyrst og fremst av ILA. Eg eri bangin fyri, at vit eru noydd at góðtaka ein álvarsligan niðurberjingarkur fyri at koma undan við lívinum. Verður ILA-sjúkan ikki bast, vil eingin seta pengar í føroysku alivinnuna, og alivinnan sjálv hevur ikki pengarnar, sum skulu til, sigur Atli Gregersen, næstformaður í Havbúnaðarfelagnum.

Og tað er júst ein álvarslig niðurberjingarætlan, ið liggur í kortunum frá almennari síðu. Vinnumálaráðið hevur sent tvær kunngerðir til hoyringar hjá Havbúnaðarfelagnum.

### Skrappur ES-kostur

ILA er ein virus, sum til ber at koppseta ímóti. Men trupulleikin hevur verið, at ES ikki vil hoyra talan um koppseting. ILA er á lista 1 hjá ES yvir sjúkur. Munn- og kleyvsjúkan er á sama lista. Talan er um sjúkur, sum ES ikki vil liva við, og tí verða tiltøk ikki góðtikin, har lív verður hildið í sjúkuni.

Føroyingar hava søkt ES um loyvi at koppseta fyri ILA, men treytin er, at vit lúka nakrar treytir fyrst. Og vit noyðast at ganga undir teirra krøv, tí mest sum allur okkara laksur verður útfluttur á evropeiska marknaðin. Tað er hesum, sum kunngerðirnar royna at ganga á møti.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, vil ikki siga so nógv um kunngerðirnar enn, tí tær helst verða broyttar ávegis.

– Eg havi biðið Fíggjarmálaráðið um tvær milliónir krónur til koppseting komandi ár, men fyri at vit sleppa at vera royndarøki fyri einari koppsetingarætlan setir ES hørð krøv, sum vit royna at eftirlíka. Fyrr enn tað er komið upp á pláss, kunnu vit ikki rokna við at sleppa at koppseta, sigur Bjarni Djurholm.

### Tvær kunngerðir

Vit skulu vísa, at vit veruliga ætla at niðurberja ILA. Ætlanin, sum Landsdjóralæknin nú hevur orðað í einari kunngerð, gongur undir hesar treytir. Kunngerðirnar eru tvær í tali. Onnur er ein rakstrarkunngerð, har Føroyar millum annað verða býttar upp í aliøki og sigur, hvussu ein alistøð skal rekast. Hin er ein ILA-kunngerð, har eftirlitið við alibrúkunum verður hert munandi.

– Vit eru svangir eftir at sleppa at vaksinera og vilja svølgja kamelar, men um tað er so rabiat, at tað gongur út yvir vanligan bóndafornuft, so kunnu vit ikki. Vit kunnu ikki fara so harðliga fram, at vit eisini útrudda alivinnuna, tí so er onki vunnið, sigur Atli Gregersen.

### Skilja ættarlið

Rakstrarkunngerðin snýr seg um at skilja ættarliðini av alifiski sundir. Føroyar verða býttar upp í 24 aliøki. Firðir skulu alast tómir og síðan leggjast stillir at hvíla, áðrenn smolt kann setast útaftur, so smittan er heilt burtur.

Siga vit, at smolt verður sett út á vári 2004, so byrja alarar at slakta á heysti í 2005. Á ólavsøku í 2006 er liðugt at slakta, og so skal fjørðurin leggjast brakk. Er einki ILA staðfest, skal hann liggja í tveir mánaðir, áðrenn setast kann útaftur. Eru spor eftir ILA, skal hann liggja í seks mánaðir, so ILA-smittan er úr umhvørvinum. Sum skilst eru stórir partar av vinnuni við upp á hesa ætlan.

### Eitt heilsupoliti

Hin parturin av ætlanini snýr seg um at herða eftirlitið við alibrúkunum munandi viðvíkjandi ILA-smittu. Talan verður um eitt heilsufrøðiligt politi, sum aktivt fer út 12 ferðir um árið.

Hvør aliringur fær sostatt vitjan eina ferð um mánaðin og fiskar verða tiknir heim til kanningar. Verður ILA funnið, so verður farið undir at slakta alt eftir einari ávísari effektivari ætlan. Uppií eftirlitinum hongur eisini eitt strangari eftirlit við, at brunnbátarnir halda seg til tær reglur, sum eru galdandi, og eitt nú ikki hava opnar ventilar.

Hesari ætlan við at gera kanningar hvønn mánað eru alarar hart ímóti, tí tað kemur at viðføra, at tú avdúkar sjúkuna langt áðrenn, hon gerst eitt hóttafall.

### Ov seint

Atli Gregersen heldur tvær høvuðsorsøkir vera til, at føroyingar fullkomiliga hava mist tamarhaldið á ILA. Onnur er, at reglugerðirnar eru komnar ov seint, og hin er, at eftirlitið hevur verið ov vánaligt.

Nú skal vinnan so taka støðu til, hvat hon heldur um broytta rakstrarháttin og herdu reglurnar við eftirliti. Atli Gregersen fær ikki sagt, hvat vinnan fer at mæla til, tí tann viðgerðin hevur ikki verið enn, men hann ávarar ímóti so hørðum tiltøkum, at alivinnan verður avhøvdað.

# Dilemma í alivinnuni

**Tíðin er komin at taka spurningin upp um ein endurgjaldsgrunn í alivinnuni, heldur Atli Gregersen, alari, men tað liggur ikki í kortunum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

ALIVINNA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Higartil hava verið tvær leiðir at bast ILA-sjúkuni: Tann skotska leiðin og tann norska. Hvørgin kosturin er mjúkur, og tí er alivinnan í einum dilemma.

Skotar hava slaktað alt, so skjótt teir fingu ein feril av ILA. Á tann hátt er nógvur fiskur farin fyri skeyti, tí hann ikki hevur verið tøkur. Føroyingar hava gingið norsku leiðina.

Tann fiskurin, sum er sjónliga sjúkur, verður tikin og burturbeindur. Síðan er bíðað eftir, at restin fær tøkustødd, áðrenn slaktað verður. Er eingi sjónlig tekin, kann fiskurin seljast til matna, og tískil er missurin ikki so stórur.

Tað hevur víst seg, at norska loysnin er ikki nóg góð, tí síðan ILA fyrstu ferð varð staðfest í 2000 hevur sjúkan breitt seg sum ringar í vatninum til alt landið.

– Vit hava roynt at funnið eina javnvág millum tað, sum er heilsufrøðiliga og fíggjarliga forsvarligt. Tað hevur ikki víst seg at rigga nóg væl, og tí mugu vit herða krøvini, sigur Bjarni Djurholm.

Atli Gregersen, næstformaður í Havbúnaðarfelagnum sigur, at verður farið at slakta alt í einum alibrúki, so skjótt ILA verður funnið, so mugu vit aftur fara at hugsa um ein niðurberjingargrunn, sum veitir alivinnuni endurgjald fyri mist virði.

– Tað kostar kanska minst 10 til 20 milliónir krónur í mistari inntøku, hvørja ferð vit mugu reinsa fiskin burtur í einum alibrúki. Tað maktar alivinnan ikki, sum er. Best hevði sjálvandi verið, um alivinnan sjálv megnaði at fíggja ein grunn, sum kann geva endurgjald, men tað klárar hon ikki. Tíðin er komin at taka spurningin aftur til viðgerðar, sigur Atli Gregersen.

Bjarni Djurholm sigur, at kjakast hevur verið um ein niðurberjingargrunn, men tað er eitt eymt punkt.

– Tað kunnu gerast stórar upphæddir at gjalda úr einum slíkum grunni, sum landið neyvan einsamalt kann fíggja. Vit hava áður roynt eina endurgjaldsskipan, har alivinnan og tað almenna rindaðu helvtina, men hon datt niðurfyri. Sum er, er eingin ætlan um at taka táttin uppaftur, sigur Bjarni Djurholm.

Oktober tilboðini halda fram



KØKUR
við borðplátu og vaski
Hendan uppsetingin
4995,-

LAMINAT KLICK GÓLV
einki lím
úr 97⁹⁵

PARKETTGÓLV
úr 199⁹⁵



ORKUSPARANDI FRYSTIBOKSIR



TL 200
Brutto 155 l
Netto 152 l
0,66 kwh/døgn
nú 2999,-
spar 412,-

TL 250
Brutto 233 l
Netto 227 l
0,81 kwh/døgn
nú 3495,-
spar 455,-

TL 350
Brutto 331 l
Netto 326 l
1,0 kwh/døgn
nú 4395,-
spar 500,-

TL 450
Brutto 403 l
Netto 397 l
1,14 kwh/døgn
nú 4675,-
spar 520,-

Sosialurin 341800



Brandt vaskimaskina WFF 1112
1100 snúningar
nú 4156,-
spar 734,-



Brandt EFM101
turkitrumla
nú 2796,50
spar 810,-

pf Klement Petersen
Høgaból · 600 Saltangará · Tel 44 75 60 · Fax 44 84 60 · handil@klementpetersen.fo